## Claus og teir snávaðu

Tað gekk ikki eftir vild hjá Blackpool í triðbestu ensku fótbóltsdeildini leygardagin. Blackpool heðvi vitjan av Brentford, sum liggur næstniðast í deildini, og púra óvæntað tapti Blackpool heili 3-1. Brentford skoraði øll málini í fyrra hálvleiki, og hóast Blackpool, har Claus Bech Jørgensen er ein av spælarunum, stríddist fyri at koma afturíaftur, gekk tað ikki. Blackpool fekk eitt troystarmál í yvirtíðini. Blackpool liggur nú nummar 7 av teimum 24 liðunum í League One.



## Uppflytarar og niðurflytarar spældu javnt

Leygardagin spældu AB og B68 venjingardyst í Gundadali. AB flutt í fjør úr 1. deild og upp í Formuladeildini, meðan B68 fór øvugtan vegin og skal spæla í næstbestu deildini í ár. Dysturin millum liðini við javnleiki 3-3. Líkt var annars til, at B68 skuldi vinna dystin, tí liðið var á odda 3-1, men tað eydnaðist AB at javna til 3-3.

Danmark-Frakland 34-27

# Wilbek gjørdi tað aftur

**Danmark bukaði Frakland av í dystinum um bronsuheiðursmerkini í HM-endaspælinum, og sostatt endaði Danmark millum trý tey ovastu fyri fyrstu ferð í 40 ár**




*Ulrik Wilbek er uttan iva størsta venjaranavnið í danskari hondbóltssøgu. Sunnudagin vann hann enn eitt heiðursmserki heim til Danmarkar, tá talan gjørdist um tryggan sigur á Fraklandi*

*Mynd: Scanpix*

**HONDBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Seinast Danmark skuldi spæla um heiðursmerki í einum HM-endaspæli var fyri 25 árum síðani, í 1982, tá teir taptu dystin um triðja plássið ímóti Póllandi. So vit skulu heili 40 ár aftur í tíðina, fyri at finna seinasta heiðursmerki hjá dønum í HM-høpi. Ta ferðina vunnu teir silvurheiðursmerki, eftir at teir taptu finaluna ímóti táverandi Tjekkoslovakia.

Í vikuskiftinum fekk Danmark so ein møguleika at vinna heiðursmerki í HM fyri fyrstu ferð í 40 ár, tá teir møttu Fraklandi í bronsudystinum.

### Danmark rann Frakland um koll

Tað var eisini týðiligt frá byrjan av, at donsku leikararnir vildu hava hatta heiðursmerki, sum Danmark ikki hevði fingið tey síðstu 40 árini.

Fyrstu løtuna gekk javnt á, men so tók Danmark dik á seg. Frá at vera frammanfyri 4-3 eftir góðar fimm minuttir, øktu danir um leiðsluna næstu løtuna. Við kontantum verjuspæli og einum Kasper Hvidt í heimsflokki megnaði Danmark at halda Fraklandi frá fatinum í teirra álopi, og so kundu donsku leikararnir bara økja meir og meir um leiðslun. Við nøkrum sera góðum og skørpum mótálopum frá serliga Lars Christiansen fór Danmark frá 4-3 uppá 11-4 uppá smáar 10 minuttir, og nú sá ikki gott út hjá franskmonnum.

Eftir knappar 15 minuttir mátti ein av mest eyðsýndu leikarunum hjá Danmark henda dagin, Lars Møller Madsen, fara av vøllinum við einum skaða, men hetta vísti seg tó ikki at bila. Aðrir komu á vøllin og tóku ábyrgd, og næstu løtuna helt Danmark fast um sjey mála leiðsluna, sum teir høvdu vunnið sær.

Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki kom Frakland eitt sindur betri við í dystin, og serliga Jerome Fernandez, sum kom inn á høgra bakk, gav dønum ymsar trupulleikar. Tá liðini fóru til hálvleiks, vóru tó enn heili seks mál á muni, og hetta mátti sigast at síggja sera gott út hjá dønum.

### Útvísingar kundu kostað

Í seinna hálvleiki gekk javnt á fyrstu løtuna, men nú tóktist Frakland vera nógv betri fyri. Teir spældu skjótan og góðan álopshondbólt, og hevði tað ikki verið fyri ein stórspælandi Kasper Hvidt í málinum, so er als ikki óhugsandi, at Frakland kundi komið rættiliga tætt eftir fyrstu 10 minuttirnar.

Hvidt bjargaði tó í fleiri umførum frá fríum franskmonnum, so tá ið knappir 10 minuttir vóru farni, førdi Danmark enn við seks málum, men so kom gongd á Frakland.

Næstu løtuna bleiv Danmark rakt av tveimum býttum útvísing upp í slag, og hesa løtuna gjørdi Frakland sær dælt av. Teir vunnu 3-0, og so vísti talvan brádliga 24-21, og nú var Frakland við at koma inna aftur í dystin.

Hetta var tó tað nærmasta, sum Frakland kom einum sigri. Ulrik Wilbek valdi at spæla við tveimum strikuspælarum síðsta korterið, og hetta gav úrslit. Danska leiðslan bleiv nú aftur bara størri og størri, og tá 10 minuttir restaðu, var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Nú høvdu fransarnir givið upp, og í síðstu álopunum slapp Jesper Nøddesbo at seta punktum. Danmark vann við sjey málum, og fyri fyrstu ferð í 40 ár kundu danir erpa sær av at hava vunnið heiðursmerki i manshondbólti.

Fyri Ulrik Wilbek er hetta tó ikki ókent. Hann hevur enn ikki roynt at verið landsliðsvenjari í einum endaspæli, og ikki enda ímillum trý tey ovastu. Wilbek megnaði enn einaferð at føra eitt danskt landslið fram í oddin, og eftir sigurin í dag má sigast, at danir virkiliga høvdu fortjent bronsuheiðursmerkini.

## Sagt eftir dystin

Stór frøi var á donsku leikarunum eftir sigurin á Fraklandi í dystinum um bronsuheiðursmerkini. Fyri fyrstu ferð í 40 ár eydnaðist Danmark at vinna heiðursmerki í einum HM-endaspæli, og sum ikki einaferð fekk Ulrik Wilbek rætt. Undan dystinum ímóti Fraklandi segði hann: "Eg havi ongantíð verið til eitt endaspæl og ikki vunnið heiðurmerki, so tað ætli eg mær heldur ikki hesa ferð." Ulrik Wilbek fekk rætt í sínum dómi. Danmark vann bronsuna, og nú kann liðið byrja at hyggja fram ímóti bæði EM og OL í 2008. Her er okkurt av tí, sum leikararnir søgdu við donsku HM-síðuna vm.tv2.dk eftir dystin.

– Hesin dysturin vísir, at vit kunnu vera við ímillum tey bestu. Vit hava eisini eitt ungt lið so framtíðin sær góð út

*Jesper Jensen, Danmark*

– Tað var keðiligt at tapa hálvfinaluna, men spælararnir spældu ein sera góan dyst í dag. Serliga verjan stóð ótrúliga væl.

*Kasper Hvidt, Danmark*

– Vit høvdu so nógva vreiði at sleppa av við eftir hálvfinalutapið, og tað sluppu vit so sanniliga. Vit høvdu fult tamarhald á teimum allan dystin, so sigurin var fult uppiborin.

*Per Leegard, Danmark*

– Hetta var fantastiskt. Eingin spælari hevur verið betri enn nakar annar í endaspælinum. Allir hava víst gott spæl, og hetta var ein liðinnsatsur, sum førdi til bronsuheiðursmerkini.

*Joachim Boldsen, Danmark*

– Málmasspælið hjá Kasper Hvidt var frá eini heilt aðrari verð, serliga í fyrra hálvleiki, og tá skal ikki so nógv til at steða Fraklandi.

*Peter Henriksen, Danmark*

– Eg eri fullkomiliga líka glaður um hálvfinaluna júst nú. Nú hava vit vunnið bronsu, og hetta skal feirast.

*Lars Rasmussen, Danmark*

– Teir vóru nógv meir tendraðir enn vit, og tann danski sigurin var ikki eitt mál ov stórur. Serliga verjan kiksaði hjá okkum í dag.

*Jerome Fernandez, Frakland*

– Vit spæla okkara besta dyst í dag, og tað er fantastiskt at vinna bronsu eftir allar hesar dystirnar. Nú vil eg virkiliga koma í eina finalu og vísa, at vit eisini kunnu vinna har.

*Michael V. Knudsen, Danmark*

– Vit manglaðu orkuna at vinna í dag. Donsku spælararnir vóru nógv meir motiveraðir enn vit, og teirra sigur var fult uppiborin.

*Nikola Karabatic, Frakland*